


# ÁRSFRÁGREIÐING 2021-2022

Aðalfundurin 07.03.2022

SÁTTMÁLI SAMEINDU TJÓÐA UM RÆTTINDI HJÁ EINSTAKLINGUM, IÐ BERA BREK

MEGD arbeiðir miðvíst við at minna á niðurstøðurnar úr ST og fyri at ávirka almenna myndugleikan at arbeiða við at gera neyðugar broytingar fyri at tryggja, at arbeitt verður út frá sáttmálanum.

www.megd.fo

ME
GD

# Innihald


1 Virksemið hjá MEGD 2021-2022 ........ 2
1.1 Starvsnevndin ........ 2
1.2 Skrivstovan ........ 2
1.2.1 Fylgjarakort ........ 3
1.2.2 Parkeringskort ........ 3
1.3 Fíggjarviðurskiftir ........ 3
1.5 ST-dagurin 24. oktober og 40 ára føðingardagur ........ 4
1.6 MEGD blað um hugburð ........ 4
1.7 Bókaútgáva ........ 4
1.8 Altjóða dagur teirra, ið bera brek ........ 4
2 ST-sáttmálin ........ 4
2.1 Talgildi samleikin og atgongd fyri verjar. ........ 5
2.1 Hagtøl og lýsing av brekøkinum ........ 6
3 Formansfundir ........ 6
4 Lógararbeiði ........ 6
5 Rættindi og luttøka ........ 6
5.1 Samskiftisdepil ........ 6
5.2 Bústaðarviðurskiftir ........ 7
5.3 Atkoma ........ 7
5.3.1 Atkomuligar matstovur ........ 7
5.3.2 Atkoma til útbúgving ........ 7
5.4 Verkfall ........ 7
5.6 Framtíðarfullmakt ........ 7
7 Ymiskt ........ 8

# 1 Virksemið hjá MEGD 2021-2022

## 1.1 Starvsnevndin

Í starvsnevndini hjá MEGD sita teir av aðalfundinum valdu limir: Forkvinnan og 4 limir.

Starvsnevndarlimir verða valdir fyri tvey ár ísenn, og kunnu verða afturvaldir eina ferð.

Forkvinnan/maðurin verður vald/ur fyri trý ár í senn, og kann veljast aftur.

Starvsnevndin skipar seg á fyrsta fundi eftir ársaðalfundin við næstformanni.

Øll viðkomandi mál verða viðgjørd í starvsnevndini, og hevur starvsnevndin ein fund um mánaðin, tó undantikið í juli. Aðalfundurin varð hildin 24. februar 2021 á Hotel Føroyum

**Tey, ið hava mannað starvsnevndina síðan aðalfundin í 2021, eru:**

Tóra við Keldu, forkvinna

Randfríð S. Sørensen, næstforkvinna

Anna Petersen

Fía Petersen

Bjørg Dam

Sonja Tausen, tiltakslimur

John William Joensen, tiltakslimur

## 1.2 Skrivstovan

Tóra við Keldu er forkvinna í MEGD er at hitta á skrivstovuni mánadag og mikudag.

Á skrivstovuni starvast Jónvør Christiansen, aðalskrivari og Steindóra á Stongunum, skrivstovufólk. Gullbjørg Rasmussen er reingerðarfólk. Jónvør Christiansen hevur sagt seg úr starvi, og søkt er eftir nýggjum aðalskrivara at byrja 1. apríl 2022.

Virksemið á skrivstovuni snýr seg um umsiting av parkerings- og fylgjarakortum, móttøku av viðskiftafólki, telefonsamskifti, ráðgeving til limafeløg, almennar myndugleikar og privatpersónar.

MEGD fær ymiskar fyrispurningar frá privatfólki, stovnum og myndugleikum. MEGD tekur sær so vítt gjørligt ikki av einstaklingamálum uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. MEGD er av tí áskoðan, at limafeløgini eru betri før fyri at loysa einstaklingamál.

**Heimasíðan**

MEGD hevur eina virkna heimasíðu, sum er umráðandi sum samskifti úteftir. Umframt hevur MEGD eisini eina virkna síðu á Facebook og Instagram.

**Húsið**

Fleiri av limafeløgunum nýta hølini í MEGD, og hevur nógv virksemið verið í húsinum, nú fleiri limafeløg skipa fyri sjálvhjálparbólkum. Somuleiðis er møguligt hjá øðrum at leiga hølini. Feløgini, sum hava skrivstovu í MEGD húsunum, eru: Sinnisbati, Gikta- , Diabetes-, Hjarta- og Psoriasisfelagið. Alzheimerfelagið og ADHD felagið hava hølir saman, og somuleiðis hava Heilafelagið og Parkinsonfelagið og Epilepsifelagið og Autismufelagið hølir saman. CP Føroyar leiga skrivstovu í kjallaranum síðan 1. august 2021.

Ábøtur á MEGD húsið hava snúð seg um máling av skrivstovuhølum í kjallaranum. Harumframt er fýrrúmið í kjallaranum umvælt, inngongd er gjørd út í gongina, og hølið er innrættað sum ein the-køkur, sum øll limafeløgini nú hava atgongd til. Umframt er oljufýringin ljóðdoyvd.

### 1.2.1 Fylgjarakort

Síðan skipanin varð sett í verk, hava 480 fólk, ið bera brek, fingið fylgjarakort. Í 2019 vóru avtalurnar um fylgjaraskipan millum MEGD, Atlantic Airways og Smyril Line endurnýggjaðar. Avtalan við Føroya Kommunufelag varð endurnýggjað í 2018. MEGD gjørdi avtalu við Náttúruterapi um fylgjaraskipan 1. oktober 2021.

### 1.2.2 Parkeringskort

Síðan skipanin við parkeringskort varð sett í gildi hava 553 fólk fingið parkeringskort. Fólk vendu sær til MEGD um møguleikan at fáa útflýggjað stovnskort, har stovnskortið er knýtt at akfari, sum hoyrir til stovnin. Við kunngerðini var tað ikki møguligt, tí eitt parkeringskort er persónligt. MEGD vendi sær til myndugleikan á økinum og 16. Februar 2021 kom nýggj kunngerð við ásetingum um stovnskort í gildi. Nú hava sambýlir fyri rørslutarnaði og bústovnar til eldri møguleika at søkja um stovnskort, har tað eru ein ella fleiri borgarar knýttir at stovninum, sum eru sera illa gongdir, hava varandi niðursett evni at virka ella onnur líknandi heilsulig viðurskifti, sum í stóran mun skerja evnini ella gera tað trupult at ferðast, og sum lúka krøvini um útgávu av parkeringskorti. Tríggir stovnar hava fingið stovnskort higartil.

## 1.3 Fíggjarviðurskiftir

Stuðulin yvir fíggjarlógina fyri 2021 var 1,65 mill. Við støði í lóg um ítróttavedding fær MEGD tillutað 5% av veddingarpengunum. Upphæddin fyri 2021 var 846.000 kr. Vit hava ikki fingið at vita enn, hvussu stór upphæddin fyri 2022 verður. Veddingarpeningurin kemur limafeløgunum og MEGD til góðar. Broytingar í býtinum av veddingarpeninginum verður lagt fyri aðalfundin í 2022.

**Býtislykilin**

Sambært viðtøkunum hjá MEGD, skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini, eftir at raksturin hjá MEGD er frádrigin. Aðalfundurin 2021 samtykti uppskotið frá Starvsnevndini at koyra 125.000 í Limagrunnin og 125.000 í Verkætlanargrunnin.

Uppskot til nýggjan býtislykil 2022 verður lagt fram á aðalfundinum.

**Limagrunnurin**
Virksemið í limafeløgunum tók seg rættiliga uppaftur eftir steðgin orsakað koronu, og vóru nógvar umsóknir viðgjørdar og játtaðar í starvsnevndinií 2021. Starvsnevndin viðgjørdi uppskot til aðalfundin 2021 um broytingar í reglunum fyri limagrunnin og samtykti at lækka egingjaldið frá 25 % til 15 %, sum merkir, at størri upphæddir eru útgoldnar úr grunninum enn undanfarin ár. Týdningarmikið er, at feløgini kunnu søkja um stuðul til tiltøk, og at peningur er tøkur í grunninum.

## 1.5 ST-dagurin 24. oktober og 40 ára føðingardagur

Tann 22. oktober hátíðarhelt MEGD 40 ára føðingardagin í Norðurlandahúsinum. Á skránni vóru framløgur, fimleika- og sangframførsla. Limafeløgini høvdu borð við áhugaverdum tilfari úti í forhøllini. Eisini var bókaframløga (1.7). Fitt av fólki var til tiltakið, og var dagurin eitt av hæddarpunktunum í árinum.

## 1.6 MEGD blað um hugburð

MEGD blaðið kom út til 40 ára føðingardagin. MEGD - blaðið hesa ferð viðger evnið hugburð lýst út frá ymiskum sjónarhornum.

Blaðið fæst við at venda sær til skrivstovuna. Blaðið kann eisini lesast á heimasíðu okkara undir SAVN.

## 1.7 Bókaútgáva

Á 40 ára degnum 22. oktober í Norðurlandahúsinum kom bókin *Vit liva og virka* út. Bókin inniheldur 24 persónligar søgur, ein frá hvørjum limafelag hjá MEGD. Snorri Brend hevur ritstjórnað. Øll, sum vóru í Norðurlandahúsinum fingu bókina, og annars fæst bókin til keyps í bókhandlunum og við at venda sær til MEGD.

## 1.8 Altjóða dagur teirra, ið bera brek

Dagurin varð hátíðarhildin í MEGD húsinum 3. des. 2021, og tiltakið var eisini stroymt. Olga Biskopstø hevði framløgu við úrslitum úr granskingarverkætlanini um livikor hjá fyritíðarpensjónistum. Úrslitini vístu, at betringar eru framdar síðan seinastu kanning í 2007, men enn eru skipanir í okkara vælferðarsamfelagi, sum krevja batar. Samlaðu úrslitini verða løgd fram í 2022.

# 2 ST-sáttmálin

MEGD arbeiðir miðvíst við at minna á niðurstøðurnar úr ST og fyri at ávirka almenna myndugleikan at arbeiða miðvíst við at gera neyðugar broytingar, fyri soleiðis at tryggja, at arbeitt verður út frá sáttmálanum og niðurstøðunum.

## 2.1 Talgildi samleikin og atgongd fyri verjar.

MEGD er gjørt varugt við, at tað er ein trupulleiki sum verji at fáa atgongd til talgildar loysnir, í hesum føri MÍNROKNING og at fáa talgilt koronupass til fólk, sum hava verju, har talgildi samleikin hjá verjanum ikki kann brúkast.

Fyri MEGD er tað týdningarmikið, at tað verður útvegað ein loysn, sum ikki útihýsir ávísar borgarar í hesum føri tey, sum eru undir verju.

Sambært verkætlanarleiðara fyri Talgildu Føroyar hava tey viðgjørt spurningin, og avbjóðingin var eisini umrødd á KT temadegi í Norðurlandahúsinum 08. oktober 2021. Niðurstøðan var at mæla til eina almenna fulltrúarloysn.

MEGD hevur samskift við myndugleikar, og fingið at vita, at tað er møguligt at gera fyriskipanir inni í einstøku almennu og privatu talgildu skipanunum, sum loyva verjum at virka fyri tann, tey eru verji fyri. Men kann hetta vera umstendiligt, og vandi fyri, at tað ikki verður gjørt. Orsøkirnar kunnu vera ymiskar.

MEGD tekur ikki støðu til, um loysnin er ein almenn fulltrúarloysn, ella at loysnin er tongd at sjálvum talgilda samleikanum sambært Lóg um talgildan samleika nr. 69 frá 9. Mai 2019 § 6, stk. 2. *Landsstýrismaðurin kann loyva øðrum persónum enn teir nevndir í stk. 1 at gerast brúkarar við fullum ella avmarkaðum rættindum til talgilda samleikan.* Men ásannandi, at alt fleiri tænastur í framtíðini verða talgildar, metir MEGD, at tað er átrokandi, at tað verður gjørt nakað við málið skjótt. MEGD hevur sent skriv til Almannamálaráðið og samskift við Fíggjarmálaráðið um hesi viðurskifti.

MEGD hevur viðmerkt í ummælisskrivi til Fíggjarmálaráðið til lógarbroyting um at lækka aldurin at fáa talgilda samleikan, har tað í viðmerkingunum verður nevnt, er ynskiligt er at seta aldursmarkið niður, tí tey 12 ára gomlu fáa í dag bjóðað koppseting fyri korona, men tey kunnu ikki fáa talgilda koronupassið fyrr enn tey eru 15 ár, eftirsum aldursmarkið fyri at fáa talgildan samleika er 15 ár.

MEGD metir, at somuleiðis er orsøk er at gera neyðugar broytingar, so talgilda koronupassið eisini kann útflýggjast til tey, sum eru undir verju.

MEGD heldur, at tað er átaluvert, at tað verða mentar almennar tænastur, sum útihýsa ein part av fólkinum.

### Samskipandi eind og brekpolitisk virkisætlan

Striltið hevur gingið at fáa samskipandi eindina sambært ST- sáttmálanum at virka. MEGD fegnaðist á vári 2019, tá *Samskipandi eindin* varð sett. Longu í 2020 var nýggj nevnd vald. Í 2021 hevur aftur verið umskipan av nevndini í Almannamálaráðnum og útskifti av umboðum í nevndini. Nevndin skuldi sambært samgonguskjalinum gera eina *yvirskipaða brekpolitiska virkisætlan fyri Føroyar (Samgonguskjal 2019-2023, s. 13),* men enn er eingin ætlan gjørd.

### Teksting og teksnmálstulking í KVF

Avbjóðingin við Teknmáls- og skrivitulkatænastuni stendur við. Ikki er tað fígging, sum vantar, men ov fáir teknmáls- og skrivitulkar. Sostatt fekk MEGD hvørki teknmálstulk ella skrivitulk til 40 ára føðingardegnum, og kundu limirnir í Deyvafelagnum ikki lýða á talur og framløgur á degnum. MEGD heitir á myndugleikarnar at gera nakað munagott fyri at útbúgva fleiri teknmálstulkar, og meta vit, at ein loysn kundi verið, at fingið danskar undirvísarar at hava undirvísingina í Føroyum, so fleiri føroyingar kundu tikið útbúgvingina.

Mannarættindaeind
Talsfólk á brekøkinum
Við støði í ST-sáttmálanum viðvíkjandi óheftum eftirliti, hevur MEGD í fleiri ár víst á, at Føroyar einki óheft eftirlit hava á brekøkinum. Málið hevur verið viðgjørt í Uttanríkisráðnum, men í mars í ár, var politisk avgerð tikin vísandi til málsbýtisfráboðanina § 44, stk. 2, at tað er landsstýriskvinnan í almannamálum, sum skal taka sær av málinum at seta í verk skipan við talsfólki til borgarar við tørvi vegna brek v.m. Grundgevingin fyri, at talsfólkið verður staðsett í Almannamálaráðnum er, at Almannamálaráðið hevur nógv tey flestu málini viðvíkjandi fólki, ið bera brek, og tí hevur tað hildið verið natúrligt, at Almannamálaráðið tekur sær av málum, viðvíkjandi teimum, ið bera brek, sum ikki hoyra til einstaka geiran ella sum eru tvørgangandi.

## 2.1 Hagtøl og lýsing av brekøkinum

Sambært grein 31 í ST- sáttmálanum skulu limalondini átaka sær at savna hóskandi upplýsingar, eisini hagtals- og granskingartilfar, sum ger tey før fyri at orða og seta í gildi reglur, ið seta sáttmálan í verk. MEGD hevur víst á, at í Føroyum mangla vit hagtøl fyri alt brekøkið. Hagtøl eru grundarlag undir gransking og gevur eina dygga yvirlitsmynd av økinum, sum kann nýtast í arbeiðinum fyri betri korum á brekøkinum. Týdningarmikið er tí frá almennari síðu at gera neyðugar fyriskipanir, sum samla inn hagtøl eftir altjóða hagtalsstandardum. Hinvegin fegnast MEGD um, at limafeløgini gera átøk, fyri at fáa hagtøl til vega, og í 2021 vóru tvær smærri verkætlanir játtaðar úr Verkætlanargrunninum hjá MEGD til hagtalsinnsavning. Umframt eru hagtøl eisini lýst í granskingarverkætlanini hjá MEGD um trivnað hjá fyritíðarpensjónistum.

# 3 Formansfundir

21. apríl var formansfundur, har Katrin Thorsvig Hansen, táverandi stjóri í Dátureftirlitinum, hevði framløgu um nýggju Dátuverndarlógina og møguleiki var at seta spurningar. Seinni formansfundur var 8. september, har sjóneykan var sett á samskiftsavbjóðingar í Føroyum, og hvørja hugsan limafeløgini hava um ein samskiftisdepil (meira um hetta í kap. 5).

# 4 Lógararbeiði

MEGD fegnast um at fáa lógaruppskot og kunngerðir til hoyringar. Øll lógaruppskotini verða send víðari til limafeløgini, sum fáa møguleika at viðmerkja. MEGD sendir ummælisskriv til øll lógaruppskot, sum verða send felagnum.

# 5 Rættindi og luttøka

## 5.1 Samskiftisdepil

MEGD hevur í fleiri umførum víst á, at tað vanta tilboð til fólk, sum hava tørv á stuðul at samskifta. MEGD mælir til, at ein Samskiftisdepil verður settur á stovn í Føroyum, har einhvør kann venda sær við samskiftisspurningum, óansæð um talan er um sjón, hoyrn, talu, rødd, kognitión, at lesa og stava ella tøknilig hjálpartól. Ein samskiftisdepil hevur vanliga tilboð um útgreinan, ráðgeving, undirvísing

og at veita hjálpartól innan samskifti. Sum áður nevnt umrøddi MEGD spurningin við limafeløgini á fundi 8. september. Eisini vitjaði MEGD í august 2021 Kommunikationscentret, sum liggur í donsku høvuðsstaðarregiónini. Á Kommunikationscentret hava tey servitanina og samstarva við kommunur um at útvega borgarum neyðugu hjálpina. MEGD metir, at ein sterkur samskiftisdepil við ymiskum serfrøðingum í samskifti kundu veitt munadyggar fakligar tænastur til fólk, sum hava einhvørja samskiftisavbjóðing. Slíka tænastu, har tað er einfalt at venda sær til, eru tað fleiri foreldur og vaksin, sum eftirlýsa. MEGD var á fundi 12. januar 2022 við landsstýrismannin Sólvit E. Nolsøe saman við umsitiningini í Almannamálaráðnum, har málið var umrøtt. Umframt hevur MEGD biðið um fund við Jenis av Rana, landsstýrismann í mentamálum.

## 5.2 Bústaðarviðurskiftir

MEGD fegnast um, at í 2021 var spakin settur í til nýggja sambýlið á Mýruni í Hoyvík, og til Heimið til børn við autismu í Kvíggjartúni á Argjum. Bíðilistin hjá Almannaverkinum til bústað er langur, og tað er leingi at bíða eftir bústaði, tískil má meiri ferð fáast á byggingina av bústøðum.

## 5.3 Atkoma

### 5.3.1 Atkomuligar matstovur

Í samband við átakið á sumri 2019 um atkomuligar matstovur í Føroyum, hevur MEGD í 2021 fingið gjørt ein lykil frá Mikkalina glas, sum var útborin til tær 18 atkomuligu matstovurnar, sum fingu viðurkenningina fyri góða atkomu.

### 5.3.2 Atkoma til útbúgving

Kanningar í DK (Larsen, Jakobsen, Mikkelsen. VIVE 2019)[1] vísa, at  færri fólk við breki fáa útbúgving og koma á arbeiðsmarknaðin samanborið við fólk uttan brek. Meginfelag Føroysku Studenta, MFS setti seg í samband við MEGD, tí tey fara at varpa ljós á møguleikar hjá lesandi, sum bera brek, at taka útbúgvingar. MEGD fegnast um, at felagið tekur hetta viðkomandi evnið upp.

## 5.4 Verkfall

MEGD eftirlýsir framhaldandi, at avtalur verða gjørdar, sum verja einstaklingar, ið bera brek, tá ósemjur eru á arbeiðsmarknaðinum. MEGD hevur aftur havt fund við landsstýrisfólkini, sum varða av økinum, og við nýggja landsstýrismannin í arbeiðsmarknaðarmálum Magnus Rasmussen.

## 5.6 Framtíðarfullmakt

MEGD sendi í 2020 áheitan til AMR, landsstýriskvinnuna í almannamálum, um at fáa fyriskipanina við framtíðar fullmakt setta í gildi í Føroyum. Í Danmark ber til at stovna framtíðar fullmakt, har ein sjálvur kann velja, hvør skal umboða ein, um ein ikki longur kann røkja síni fíggjarligu ella persónligu

[1] https://www.vive.dk/da/udgivelser/handicap-og-beskaeftigelse-2019-15458/

áhugamál orsakað av sjúku, viknaðum andsevnum ella líknandi[2]. Málið (LM-24/2021) var til 1. viðgerð 8. november 2021[3] og samtykt tann 07.12.2021.

# 7 Ymiskt

## Norðurlendskt samstarv

### HNR Handikapporganisasjonenes Nordiske Råd

Noregi hevur formansskapin í HNR (Handikaporganisationernes Nordiske Råd) 2021-2023. Tey, ið sita sum umboð fyri tey Norðurlendsku meginfeløgini eru formenn/kvinnur og aðalskrivarar í meginfeløgunum. Orsakað koronu hava hálvárligu fundirnir verið yvir netið, men um mánaðarskiftið oktober-november 2021 var fundur hildin í Keypmannahavn, har forkvinna og aðalskrivari hjá MEGD kundu luttaka. Í samband við fundin var áhugavert at hoyra umboð fyri Dansk Menneskerettighedsinstitut greiða frá teirra arbeiði.

**Rådet för Nordiskt samarbejde** hevur verið virkið síðan 2013. Tóra við Keldu, forkvinna, umboðar MEGD í ráðnum, og Jónvør Christiansen, aðalskrivari, er tiltakslimur.

## Umboðan í Ráðum og nevndum í Føroyum

### Dugni

Tóra við Keldu umboðar MEGD í ráðnum fyri Dugna.

### Ráðið fyri ferðslutrygd

Tóra við Keldu umboðar MEGD í Ráðnum fyri ferðslutrygd.

### Javnstøðunevndin

Í samband við kærur um mismun á arbeiðsmarknaðinum skal MEGD hava umboð í arbeiðinum at viðgera kærur sambært lóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum. Jónvør Christiansen, aðalskrivari umboðar MEGD í nevndini og Tóra við Keldu er varaumboð.

### Psykiatriska sjúklingakærunevndin

Nýggir limir eru valdir í nevndina, og fyri MEGD var Oda Jóhansdóttir skotin upp sum limur og Vivian Sjóðklett sum varalimur at taka sæti í nevndini.

---

[2] Keldur: Lov om fuldtidsfuldmagter: https://www.retsinformation.dk/Forms/R0710.aspx?id=180174
Familieretshuset: https://familieretshuset.dk/fremtidsfuldmagt/fremtidsfuldmagt
Alzheimerforeningen. Dk https://www.alzheimer.dk/nyheder/2017/fremtidsfuldmagten-traeder-i-kraft-1september/

[3] https://www.logting.fo/mal/mal/?id=9822

**Sjúklingaráðið**
Kristianna Rein, Diabetesfelagið umboðar MEGD í Sjúklingaráðnum. Uppskot til broyting av Sjúklingaráðnum, har limatalið verður minkað frá nýggju til fimm limir, og ásett meira greitt, hvørjar uppgávur og skyldur Sjúklingaráðið hevur, var sent MEGD til ummælis við svarfreist 14. januar 2022. Ætlandi kemur kunngerðin í gildi 1. mai. 2022.

*14/02/2022/Jónvør Christiansen, aðalskrivari*